Annika Petersen

Fra: Jenny Persson - T210246 <jpo@banknordik.fo>
Sendt: 29. januar 2020 14:56
Til: VMR-Journal
Cc: Rune Nørregaard - S161514
Emne: Vedr.: Vs: Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) til hoyringar
Vedhæftede filer: Uppskot til løgtingslóg um fyribyrging av hvítvasking og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin).docx; Hvítvasklóg, ummæli BankNordik.pdf

Til rætta viðkomandi,

Viðheft eru viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um fyribyrging og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) frá BankNordik.

Vinarliga / Best regards

Jenny Persson
Løgfrøðingur / Jurist

BANKNORDIK

BankNordik
Oknarvegur 5
Boks 3048
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
V-tal 322059

Tel +298 330312 Mob +298 230312
jpo@banknordik.fo www.banknordik.fo

----- Videresendt af Fríðunn Vang Jacobsen - T209721/Føroya Banki den 09-01-2020 09:24 -----

Fra: Annika Petersen <AnnikaHenrikkaHannaP@uvmr.fo>
Til: Fíggjarmálaráðið <fmr@fmr.fo>, Journalin hjá LMS <journalin@tinganes.fo>, "dat@dat.fo" <dat@dat.fo>, Tryggingareftirlitið <tryggingareftirlitid@tryggingareftirlitid.fo>, Skráseting <skr@skraseting.fo>, Vinnuhúsið <industry@industry.fo>, "petersen@adv.fo" <petersen@adv.fo>, "pensjon@betri.fo" <pensjon@betri.fo>, "liv@liv.fo" <liv@liv.fo>, "kundi@banknordik.fo" <kundi@banknordik.fo>, "fafelag@fafelag.fo" <fafelag@fafelag.fo>, "handverk@handverk.fo" <handverk@handverk.fo>, "heim@betri.fo" <heim@betri.fo>, "meklarin@meklarin.fo" <meklarin@meklarin.fo>, "skyn@skyn.fo" <skyn@skyn.fo>, Landsbanki Føroya <landsbankin@landsbankin.fo>
Cc: Sørin Pram Sørensen <SorinPramS@uvmr.fo>, Pól Edvard Egholm <pole@uvmr.fo>
Dato: 08-01-2020 19:04
Emne: Uppskot til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) til hoyringar

---

Til hoyringarpartarnar.

Viðhefta uppskot til løgtingslóg um fyribyrging av hvítvasking og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin) verður hervið sent tykkum til hoyringar.
Hoyringarfreistin er sett til **hósdagin 30. januar 2020.**

Vinaliga sendið møguligar viðmerkingar til uvmr@uvmr.fo

Vinaliga váttið fyri móttøku.

Blíðar heilsanir
Annika Petersen
Umhvørvis- og vinnumálaráðið.

BankNordik: Ummælisskriv til løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin), tykkara mál nr. 19/00515

BankNordik tekur í høvuðsheitum undir við lógaruppskotinum og tekur somuleiðis undir við endamálinum við lógaruppskotinum, at tryggja, at Føroyar viðvirka í altjóða stríðnum móti hvítvasking av pengum og fígging av yvirgangi.

Av tí at tað á ikki yvirtiknum málsøkjum, m.a. á bankaøkinum, er kunngjørt fyriskipan nr. 813 av 12. august 2019, sum kom í gildi 1. septembur 2019, er hetta lógaruppskotið bert viðvíkjandi yvirtiknum málsøkjum. Men av tí at hvítvaskfyriskipanin og hvítvasklógin skulu virka saman, er neyðugt at hava hvítvaskfyriskipanina í huga, tá ið hetta lógaruppskotið verður ummælt.

Bankin hevur í hesum sambandi nakrar viðmerkingar til lógargreinar í uppskotinum:

Viðvíkjandi lógarøki:
Í § 1, stk. 1, nr. 4, stendur skrivað, at *"Aðrar fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna virksemi viðvíkjandi veitan av lánum við skrásettum panti í fastogn ella í skipum við støði í útgávu av lánsbrøvum, sbr. tó stk. 3".* Hetta er ein nýggj áseting í mun til galdandi hvítvaskløgtingslóg. Endamálið við hesi áseting er at tryggja, at Realurin, Føroya Realkreditstovnur, verður fevndur av lógini – soleiðis sum tað í roynd og veru longu er í dag. Føroya Realkreditstovnur, Realurin, er longu umfataður av galdandi hvítvaskløgtingslóg í § 1, stk. 1, nr. 1, og lógaruppskotið broytur ikki orðingina í hesum lógaruppskoti.

Um endamálið er at umfata aðrar fyritøkur, ið veita somu veiting sum Realurin, metur BankNordik ikki, at hetta er greitt orða í § 1, stk. 1, nr. 4. Um endamálið bert er at Realurin skal verða umfataður av lógaruppskotinum, verður hetta skrivað tvær ferðir beint eftir hvørt annað.

Tilmæli 1: Mælt verður til, at grein § 1, stk. 1, nr. 1 og nr. 4 verða lagdar saman soleiðis at har ikki verða tvær greinir, ið lýsa sama virkisøkið ella at § 1, stk. 1, nr. 4 verður orða soleiðis *"Aðrar fyritøkur og persónar, sum vinnuliga útinna sama virksemi sum bólkurin nevndur í nr. 1, viðvíkjandi veitan av lánum við skrásettum panti í fastogn ella í skipum við støði í útgávu av lánsbrøvum, sbr. tó stk. 3".*

Viðvíkjandi kontantgjaldsbann:
Í § 1, stk. 2, í lógaruppskotinum verður ásett, at *"§ 5 fevnir um vinnurekandi, sum ikki er umfataði av stk. 1.".* Hetta er ein nýggj áseting í § 1, stk. 2, sum hevur við sær, at § 5 viðvíkjandi kontangjaldsbann verður galdandi fyri vinnurekandi, ið ikki eru fevnd av stk. 1 í lógaruppskotinum. Í galdandi hvítvaskløgtingslóg § 2 um forboð ímóti kontantgjaldi, er ásett ein vinnubólkur, sum er fevndur av forboðnum. Tað er tí ikki ásett at øll vinnurekandi, ið ikki eru umfataði av § 1, stk. 1, eru umfataði av kontangjaldsbanninum.

Soleiðis sum § 1, stk. 2 og § 5 nú er orða, verður álagt eitt kontantgjaldsbann á vinnurekandi, ið ikki eru umfataði av lógaruppskotinum – tað vil tí eisini umfata peningastovnar, advokatar vm., ið ikki eru umfataði av lógaruppskotinum, men bert eru umfataði av hvítvaskfyriskipanini. Hetta er væntandi og vónandi ikki tilætlað og tí burdi § 1, stk. 2 og § 5 verði orða øðrvísi.

Tilmæli 2: Mælt verður til, at § 1, stk. 2 verður orða soleiðis: "*§ 5 fevnir um vinnurekandi, sum ikki eru umfataði av stk. 1, ella § 1, stk. 1 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven)*" og at § 5 verður orða soleiðis: "*Vinnurekandi, sum ikki eru fevnd av § 1, stk. 1, ella § 1, stk. 1 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven), mugu ikki taka ímóti kontantgjaldingum á 50.000 kr. ella meira, uttan mun til um gjaldingar, sum eru ella sýnast at verða sínámilllum tengdar.*"

Viðvíkjandi váðmeting og váðatýring
Sambært §§ 6-8 í lógaruppskotinum verður frameftir álagt fyritøkum og persónum, ið eru umfataði í lógaruppskotinum, at hava eina váðameting og váðastýring í mun til at fyribyrgja og forða fyri hvítvasking og fígging av yvirgangi. Hesar skulu verða skrivligar og skulu dagførast.

Harumframt verður álagt fyritøkum fevndar av § 1, stk. 1, nr. 1-4 at hava ein hvítvaskábyrgdara sambært § 6, stk. 2, ið hevur ábyrgdina av at góðkenna politikkir, mannagongdir og eftirlitsskipanir.

Í lógaruppskotinum verður samtaksspurdómur orðaður í § 8, meðan § 7 snýr seg um hvørja einstøku fyritøku í einum samtakshøpi. Lógaruppskotið leggur tískil upp til, at í einum samtaki, skal hvør fyritøka, ið er fevnd av lógaruppskotinum, uppfylla krøvini í § 7, samstundis við at samtakið út yvir hetta, skal upfylla krøvini í § 8.

Tilmæli 3: Mælt verður til, at gildistíðin fyri §§6-8 í lógaruppskotinum verður útsett, soleiðis at fyritøkur, ið verða álagdar hesa eyka ábyrgd, hava stundir at uppfylla øll nýggju krøvini, ið eru komin við nýggja lógaruppskotinum og sum eru tíðarkrevjandi at fremja.

Viðvíkjandi kundakunnleikamannagongdir
Í § 10 í lógaruppskotinum verða vanligu krøvini til kundakunnleikamannagongidr viðgjørdar og § 10, stk. 2, snýr seg um støður, har ein persónur handlar vegna ein annan kunda. § 10, stk. 2, 2. pkt er orða soleiðis "*Fyritøkur og persónar skulu harumframt tryggja, at likamligir ella løgrfrøðiligir persónar, sum handla vegna ein kunda, hava heimild til tess, sbr. tó § 11, stk. 2, 2. pkt., í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven).*"

Sambært § 11, stk. 2, 2. pkt., í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven) er undantakið, sum tilvíst verður til í § 10, stk. 2, 2. pkt., í teimum førum at viðkomandi er advokatur við tilnevning her í landinum.

Men sambært "Almennar viðmerkingar" til § 10 er skrivað, at undantakið í § 11, stk. 2, 2. pkt., í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven) umfatar teimum førum at viðkomandi er advokatur við tilnevning her í landinum *ella í einum ES- ella EBS-landi*. Hetta er tó ikki tað sum stendur í § 11, stk. 2, 2. pkt., í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven).

Tilmæli 4: Mælt verður til, at í § 10, stk. 2, 2. pkt. í staðin fyri at vísa til undantak í anordning, verður skrivað nágreinuliga hvat undantakið umfatar, soleiðis at hetta verður orðað greitt, og tað tilætlaða undantakið veruliga verður tað sum verður galdandi. Mælt verður tí til, at § 10, stk. 2, 2. pkt verður skrivað soleiðis: *Fyritøkur og persónar skulu harumframt tryggja, at likamligir ella løgfrøðiligir persónar, sum handla vegna ein kunda, hava heimild til tess, tó ikki um viðkomandi er advokatur við tilnevning her í landinum.*

Viðvíkjandi herd krøv
Í § 17 í lógaruppskotinum, verða politisk ábærir persónar viðgjørdir og í stk. 5 verður skrivað, at um ein politisk ábærur persónur er tilskilaður sambært tryggingarskjalinum skal hvítvaskábyrgdarin, § 6, stk. 2 fáa boð um hetta. Tað verður gjørt vart við at hendan greinin ikki er galdandi í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven), og er hetta tí ikki nakað ein peningastovnur er álagdur at kanna og gera.

Sambært § 17, stk. 7 í lógarupskotinum skrásetur og almannakunnger Landsstýrismaðurin eitt yvirlit við nøvnum á persónum, sum eru fevnd av § 2, stk. 8 í lógaruppskotinum.

Tilmæli 5: Mælt verður til, at yvirlitið við nøvnum av politiskt ábærir persónar verður lýst soleiðis at yvirlitið er galdandi í seinasta lagi frá tí degi lógaruppskotið kemur í gildi, og tað á hendan hátt verður møguligt at fylgja hesi lógaráseting.

Hjálp frá tríjamanni
Í § 21, stk. 1, nr. 1 í lógaruppskotinum verður nevnt, at fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av lógaruppskotinum, kunnu lata triðjamann upp í hendur at útvega og eftirkanna upplýsingar eftir § 10, stk. 1, nr. 1-4, um upplýsingarnar verða gjørdar tøkar av: *eini fyritøku ella persóni, fevnd av § 1, stk. 1.*

Eftir hedari áseting, verður ikki møguligt at útvega hesa uppgávu til fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av § 1, stk. 1 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven).

Tað vil í hesum førum merkja, at um ein advokatur ella ein peningastovnur hevur heintað inn upplýsingar eftir § 10, stk. 1, nr. 1-4, er hetta ikki nøktandi. Tað er ivasamt um hetta er tilæltlað.

Tilmæli 6: Mælt verður til, at § 21, stk. 1, nr. 1 í lógaruppskotinum verður orða soleiðis, at bólkurin, ið er nevndur verður víðkaður til at umfata fyritøkur og persónar, ið eru fevnd av § 1, stk. 1 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven).

Viðvíkjandi kanningar-, notering-, fráboðanar- og varðveitsluskylda
Í § 25, stk. 4, 2. pkt. í lógaruppskotinum verður skrivað, *"Um avgerð hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet viðvíkjandi inndrátti galda reglurnar í § 26, stk. 4, 2. pkt., í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven), samsvarandi."*

Í § 26, stk. 4, 2. pkt. í hvítvaskfyriskipanini stendur *"Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet beslutter hurtigst muligt og senest inden udløbet af den efterfølgende bankdag efter at have modtaget underretning, hvordvidt der skal ske beslaglæggelse."*

Í lógaruppskotinum verður víst til hvítvaskfyriskipanina, at lesa nærri um svarfreistina hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet í mun til avgerð um inndrátti. Eftir lógaruppskotinum at døma, er eingin munur at finna í freistini, ið skal verða galdandi fyri lógaruppskotið í mun til hvítvaskfyriskipanina, og verður hendan greinin tí heldur torfør at lesa á ein skiljandi hátt fyri fyritøkur og persónar, ið skulu fáa ágóðan av upplýsingunum í greinini.

Tilmæli 7: Mælt verður til, at § 25, stk. 4, 2. pkt. í lógaruppskotinum verður orðað soleiðis, at svarfreistin hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet er at finna í sjálvari greinini, so tað verður lættari at fyrihalda seg til hjá fyritøkum og persónum, ið eru umfatað av hesi lóggávu og sum skulu fráboða sambært § 25. Mælt verður tí til, at § 25, stk. 4, 2. pkt., verður orða soleiðis: *"Avgerð hjá Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet viðvíkjandi inndrátti skal verða tikin skjótast gjørligt og í seinasta lag áðrenn næsti bankadagur er lokin."*

Viðvíkjandi kanningar-, notering-, fráboðanar- og varðveitsluskylda
Í § 29 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven), hevur Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet heimild til at geva fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av hvítvaskfyriskipanini, og sum hava fráboðað sambært § 26 og § 28 í hvítvaskfyriskipanini, støðuboð í einari sak tey hava fráboðað, um eingin viðurskifti tala ímóti hesum. Í lógaruppskotinum er hendan greinin ikki tikin við, og fyritøkur og persónar fevnd av lógaruppskotinum, kunnu tí ikki fáa upplýsingar um eina sak, sum tey hava fráboðað.

Tilmæli 8: Mælt verður til, at § 29 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven) verður tikin við í lógaruppskotinum.

Viðvíkjandi tagnarskyldu og ábyrgd
Í § 35 í lógaruppskotinum verður ásett fyritøkum og persónum, ið eru fevnd av lógaruppskotinum, at halda loyniligt, at fráboðan er latin erftir § 25, stk. 1 og 2, ella at hetta verður umhugsað, ella at ein kanning er ella fer at verða sett í verk eftir § 25, stk. 1. Hesa áseting kennist aftur frá hvítvaskfyriskipanini, ið er orða eins og hetta.

Soleiðis sum § 35, stk. 3 er orða, er bert møguligt at lata upplýsingar víðari millum fyritøkur í samtøkum, fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-12, og aðrar fyritøkur í samtakinum, *ið hava heimstað ella eru heimhoyrandi í einum ES- ella EBS-landi.* Eftir hesum at døma, er tí ikki møguligt at lata upplýsingar víðari millum fyritøkur í samtøkum, sum eru fevnd av § 1, stk. 1 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven), sum hava heimstað í Føroyum.

Tilmæli 9: Mælt verður til, at í § 35, stk. 3, verður skoytt uppí, at tað eisini er møguligt at lata upplýsingar víðari millum fyritøkur í samtøkum, ið eru fevnd av § 1, stk. 1, nr. 1-12 *ella § 1, stk. 1, í anordning om*

ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorsime (hvidvaskloven).

Viðvíkjandi eftirlit
Í § 42, stk. 1, í lógaruppskotinum verður heimilað Tryggingareftirlitinum at almannakunngerða boð, ið eru givin sambært § 47, stk. 1 og stk. 2 ella § 51 á heimasíðuni hjá Tryggingareftirlitinum. Tá tað verður lisið nærri í § 47 í lógaruppskotinum, snýr hendan greinin seg um heimildina hjá Skráseting Føroya at geva boð og § 51 í lógaruppskotinum er undir yvirskriftini "samskifti og samstarvsbólkar".

Tilvísingin í § 42, stk. 1, er eftir øllum at døma skeiv, tá hendan er tann sama sum er í hvítvaskfyriskipanina, og greinirnar eru ikki eins allan vegin ígjøgnum. Soleiðis sum § 42 stk. 1 nú er orðað, er ikki møguligt hjá Tryggingareftirlitinum at almannakunngerða boð, ið eru givin sambært § 36 ella § 38 í lógaruppskotinum, ið siga tað sama sum § 47 og § 51 í hvítvaskfyriskipanina.

Sambært "Almennar viðmerkingar" til § 42 í lógaruppskotinum er § 42 orðað eins og § 55 í hvítvaskfyriskipanini. Hetta er tó ikki júst veruleikin, tí í lógaruppkotinum er § 42 bert fram til stk. 5 og stk. 6-7 eru tí ikki við í § 42 í lógaruppskotinum. Tó er byrja uppá "stk. 6" og tí er óvist, um tað er tilætlað, at stk. 6-7 skulu við ella ikki.

Tilmæli 10: Mælt verður til, at tilvísingarnar "§ 47, stk. 1 og stk. 2 ella § 51" verða broyttar til "§ 36 ella § 38", og at tað verður greitt tikið støðu til, um stk. 6-7 skulu verða galdandi og um ikki, at *"stk. 6"* verður tikið úr lógaruppskotinum.

Viðvíkjandi samskifti og samstarvsbólkar
Í § 54 í lógaruppskotinum verður nú ein møguleiki hjá landsstýrismanninum at seta ein bólk við luttøku av eftirlitsmyndugleikunum sambært lógaruppskotinum. Sambært "Almennar viðmerkingar" til § 54 er skrivað, at ásetingin í § 53 er orðað einsljóðandi við § 74 í hvítvaskfyriskipanini og skal skiljast á sama hátt. Tað er væntandi eitt mistak at tað stendur § 53 og ikki § 54.

Sambært § 74 í hvítvaskfyriskipanini er hetta ikki ein møguleiki, men eitt krav, og skal tað tí verða stovnaður ein bólkur, ið hevur til endamál at tryggja samstarv millum myndugleikar innan landamarkið. Bólkurin kemur eisini við íkasti til tí tjóðskaparligu váðametingini, ið loypandi verður dagført. Soleiðis sum § 54 í lógaruppskotinum er orðað, er hetta ikki eitt krav, men ein møguleiki, ið kann setast í verk.

Tilmæli 11: Mælt verður til, ásetingin í § 54 í lógaruppskotinum, verður orðað einsljóðandi við § 74 í hvítvaskfyriskipanini, soleiðis at hon kann skiljast á sama hátt, sum hevur verið tilætlað sambært "Almennar viðmerkingar" til § 54.

Viðvíkjandi revsing
Í § 57 í lógaruppskotinum viðvíkjandi revsing er hendan greinin ikki orðað einsljóðandi § 78 í hvítvaskfyriskipanini. Sambært § 78, stk. 3 verður bótin sambært stk. 1, áløgd eftir hesum ásetingum "*ved udmåling af bøder efter stk. 1 skal der lægges vægt på gerningspersonens økonomiske forhold. For*

ovetrædelse begået af virksomheder lægges vægt på virksomhedens nettoomsæting på gerningstidspunktet."

Ásetingin í § 78, stk. 3 í hvítvaskfyriskipanini, sum longu nú er galdandi á ikki yvirtiknum málsøkjum, m.a. fyri peningastovnar, advokatar vm. fylgir rørsluni í samtíðini um herd krøv av hvítvasklógini. Á hendan hátt er møguligt at áleggja bøtur í mun til tað ítøkiliga brotið av lógini, um brotið var tilætlað og fíggjarliga støðan hjá brotsmanninum.

Tilmæli 12: Mælt verður til, at stk. 3 í hvítvaskfyriskipanini verður tikið við í lógaruppskotinum, soleiðis at bøturnar verða settar javnt fyri allar fyritøkur og persónar, ið eru umfatað av hvítvaskfyriskipanini ella lógaruppskotinum – uttan mun til um málsøkið er yvirtikið ella ikki.

Viðmerkingar annars
Í gjøgnum alt lógaruppskotið, er danska orðið 'transaktion' stava á nógvar ymsar hættir, við/uttan 'j', við/uttan 's' og sumstaðni við fleiri 'ss' vm. Mælt verður til, at har verður funnið ein máti at stava hetta orðið uppá, annaðhvørt *transaktión* ella *transaksjón*.

Tilvísingarnar í lógaruppskotinum eru í fleiri førum skeivar. Hetta sæst, tá tilvíst verður til somu grein sum í hvítvaskfyriskipanini, og allar greinirnar fylgjast ikki at, tá okkurt er tikið úr hesum lógaruppskotinum. Serliga sæst hetta í § 35, har tilvíst verður til § 25, men veruliga átti at verði tilvíst til § 24. Mælt verður til, at allar tilvísingar verða eftirkannaðar, fyri at tryggja at hesar eru rættar, tá hetta er sera avgerandi.

Nógva staðni verður skrivað "landstýrismaðurin" uttan at ávísa innan hvat øki, og aðra staðni verður skrivað "landstýrismaðurin í vinnumálum". Tað hevði verið skilagott at hetta var eins allan vegin ígjøgnum.

At enda verður mælt til, at lógaruppskotið verður rættlisið fyri smáum stavi- og tøppivillum, ið eru nógvar í tali.